**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos

# Hetta hendir í summar



STEVNIR, DAGAR OG FESTIVALAR. Í **SUMMAR** ER IKKI AT SITA **HEIMA** OG **KÚRA**. VIT HAVA SAVNA **TILTØKINI** SAMAN SO TÚ KANN KLIPPA ÚT OG **HANGA** Á KULDASKÁPIÐ

JUNI



## Elton John á Tórsvølli

***29. juni fer Sir Elton John at spæla á stórari Open-Air konsert í Havn***

Við fleiri enn 250 milliónum seldum fløgum er Elton John ein av allarstørstu stjørnunum í tónleikaheiminum yvirhøvur. Elton John hevur í fleiri enn 40 ár verið ovast á tónleikatindunum. Hann hevur spælt inn fleiri enn 30 fløgur/albums, umframt LIVE-upptøkur og fløgur til filmstónleik. Elton John hevur eitt ótal av hittum, og hevur vunnið fimm Grammy awards, ein Oscars Acadamy Award, eina Golden Globe Award og eina Tony Award. Í 2008 varð hann av Billboard Magazine staðfestur at verða tann mest succesríki mannligur solistur á Billboard Hot Top 100 listanum nakrantíð.

JULI




## Barnafestivalurin 2010

***Triðja árið á rað, skipar Margarinfabrikkin fyri Barnafestivali í Grasagarði***

Bæði í fjør og fyrra árið, var tiltakið ein brakandi succés og atgongumerkini vóru rivin vekk. Fyri at geva enn fleiri børnum møguleika at sleppa á Barnafestival, og fyri at gera tiltakið enn meira spennandi, er økið víðka, soleiðis at fleiri av tiltøkunum verða í Kommunuskúlagarðinum. Barnafestivalurin verður leygardagin 3. juli, og økið letur upp kl. 11. Skráin er sera spennandi og umfatandi. Høvuðsnavnið í ár, er Jesper frá X-factor. Annars verður Ævintýraferðin, Trøllapætur, Kular Røtur, ung talent, el-bilar, søgufrásøgn, grill, andlitsmáling, smábarnaøki og alt møguligt annað stuttligt

AUGUST




## MIF TOP RUN

***Mjørkadals Ítróttarfelag (MÍF) skipar fyri MIF TOP RUN, fyri 8. ferð***

MIF TOP RUN er motiónsrenning. Tað vil siga, at øll, sum javnan motiónera, kunnu vera við. TOP RUN er ein avbjóðing, tí teinurin er móti brekku nærum allan vegin. Renningin byrjar vid Statoilstøðina í Kollfjarðadali (75 metrar yvir havinum) og endar á Sornfelli (680 metrar yvir havinum), eitt strekkið uppá 9,8 km.

Tað er ókeypis at luttaka. Allir luttakararnir, sum gjøgnumføra fáa eitt diplom eftir renningina.

## JUNI

| | |
|---|---|
| 12. | Sangbólkurin Vitin og Russ Taff í Klaksvík |
| 12. | Sundalagsstevna í Hvalvík |
| 14.-20. | Eystanstevna í Runavík |
| 19. | Urðardansur í Kvívík |
| 19. | Mentanardagur í Mykinesi |
| 19. | KomVið á Sandi |
| 19. | Úr Sandvík til Akraberg |
| 26. | Jóansøkubál í Funningsfirði |
| 25.-27. | Jóansøka í Vági |
| 26. | Víkingadagar í Leirvík og Gøtu |
| 24.-27. | Summartónar kring alt landið |
| **29.** | **Elton John á Tórsvølli í Tórshavn** |

## JULI

| | |
|---|---|
| 2.-4. | Fjarðastevna í Vestmanna |
| 2.-4. | Varmakelda í Fuglafirði |
| 3.-4. | Úr Sandvík til Akraberg |
| 3. | Útoyggjastevna í Heysti |
| **3.** | **Barnafestivalur í Grasagarði í Havn** |
| 9. | Framsýning við Selmu Mikladal, Galerie Focus í Havn |
| 9.-11. | Vestanstevna í Sørvági |
| 10.-11. | Bryggjudansur í Havn |
| 15.-17. | G! festivalur í Gøtu |
| 17. | Laksa- og sølutorg í Runavík |
| 27. | Ólavsøkukonsert í Havn |
| 28.-29. | Ólavsøka í Havn |

## AUGUST

| | |
|---|---|
| 5.-8. | Summarfestivalur í Klaksvík |
| 6.-9. | Regatta í Hósvík |
| 12.-15. | Almenn summarlega á Selatrað |
| 14.-16. | Ovasteva í Nólsoy |
| 18.-22. | Føroya Sjómannadagur í Klaksvík |
| 20.-22. | Sandoyarstevna |
| 28.-29. | Ullarfestivalur í Vágum |
| **28.** | **MIF Top Run í Kollafirði** |

**KELDUR:**
FIVESTAR, VISITFAROEISLANDS.FO, KUNNING.FO